# Skrivstovufólk til Vestmanna Skúla

Søkt verður eftir skrivstovufólki at arbeiða hálva tíð í Vestmanna Skúla at byrja skjótast til ber.

**Arbeiðið fevnir m.a. um:**
alt vanligt skrivstovuarbeiði, herundir avgreiðsla av viðskiftafólki, telefon- og postavgreiðslu, journalisering, fakturering og lættari málsviðgerð.

Talan er um eitt hálvtíðarstarv. Arbeiðsbyrðan er tó skiftandi gjøgnum árið, og ynskiligt er, at tann setti kann átaka sær eyka uppgávur, tá ið á stendur.

**Vit vænta, at tú:**
- hevur skrivstovuútbúgving og/ella royndir frá skrivstovuarbeiði
- hevur góðar telduførleikar til vanligu forritini
- dugir væl at samskifta á føroyskum í skrift og talu og kann gera teg skilligan á norðurlendskum og enskum máli
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt og í toymi
- ert fleksibul og dugir at fasthalda yvirlitið

**Lønarviðurskifti**
Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.
Setanarøkið er Vestmanna Kommuna; setanarstaður er Vestmanna Skúli.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Marin Bláberg, skúlastjóra, á tlf. 230 100.

**Skrivlig umsókn**
skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin 20. februar 2019 kl. 12
og skal sendast til:

**Vestmanna Kommunu**
**Bakkavegur 8**
**Postboks 91**
**355 Vestmanna**
**ella til vestmanna@vestmanna.fo**